Veðrið

Fimmdagaforsøgnin frá DMI

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Lítið lot av ymsum ættum, seinni gul av eystri. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Hann minkar vindin undir andøvsgul av útnyrðingi og kaldari veður við ælingi.

Nýggju vatnbrunnarnir hjá kollfirðingum liggja Todnesmegin Frammi í Botni
Mynd: Edvard Joensen

Nýggj vatnveiting í Kollafirði

Kollafjarðar Kommuna ger íløgu upp á fimm milliónir í nýggja vatnveiting. Talan er um brunnar, reinsiverk og leiðing um alla bygdina

EDVARD JOENSEN

Kollafjarðar Kommuna hevur gjørt tveir nýggjar vatnbrunnar í Todneshaganum Frammi í Botni. Teir taka 1.000 tons tilsamans.

Brunnarnir eru liður í eini heildarútbygging av vatnveitingini í Kollafirði, sigur Hans Jacob Hansen, bygdarráðsformaður í Kollafirði.

Umframt báðar brunnarnar er eisini eitt nýtt reinsiverk sett upp. Hetta reinsiverkið er komið liðugt monterað úr Danmark.

Eisini er nýggj vatnleiðing løgd um alla bygdina, og tað er langt. Úr Sundunum og út á Signabø hinumegin. Hetta er ikki heilt liðugt enn, men verður tað í næstum. Samlaði kostnaðurin er ikki endaliga uppgjørdur enn, sigur Hans Jacob Hansen, men hann fer at liggja um tær fimm milliónirnar.

Nýggja vatnveitingin er ikki tikin í nýtslu, tí brunnarnir eru ov feskir enn. Teir skuldu gerast lidnir hósdagin og skulu so hava tíð at stadna, áðrenn vatn verður latið í teir.

Gamla vatnveitingin í Kollafirði var úr einum brunni, sum gjørdur var í Botnánni. Men hetta var ikki nóg gott. Har var hvørki nóg nógv ella nóg reint vatn, sigur Hans Jacob Hansen, bygdarráðsformaður. Neyðugt var at hava fleiri brunnar ymsastaðni í kommununi.

Hesum slepst undan nú. Nýggju brunnarnir eru lagdir í 90 metra hædd, soleiðis at trýstið á reinsiverkinum alla tíðina er í lagi. Við hesum fallinum ber eisini til at føða alla bygdina við vatni, sigur bygdarráðsformaðurin. Og nú kann hann tryggja øllum kollfirðingum reint vatn.

Brunnarnir eru gjørdir soleiðis, at til ber at byggja út, um tørvur skuldi verið á tí. Um illa vil til, er gamli brunnurin enn tøkur, og so kann pumpast úr honum upp í nýggju brunnarnar, sigur Hans Jacob Hansen.

Hann sigur tó, at hann væntar ikki, at so verður. Nýggju brunnarnir eru fluttir út Todnesmegin, tí ov lítið vatn var Sjóarmegin. Har nýggju brunnarnir eru, er upplandið betri og eisini eru fleiri keldur at taka úr, sigur Hans Jacob Hansen, bygdarrráðsformaður í Kollafirði.

Nú vatnleiðin verður løgd runt allan fjørðin, er sjálvandi nakað nógv grivið og lagt aftur. Og tað er stórarbeiði. Men hetta er gjørt í samstarvi við SEV og Føroya Tele, soleiðis at útreiðslurnar eru hildnar væl niðri, sigur bygdarráðsformaðurin í Kollafirði.

Men vegurin skal asfalterast, tá alt er liðugt. Hetta arbeiðið verður gjørt í summar, sigur Hans Jacob Hansen. Og tað fer Kollafjarðar Kommuna at gera.

Tað er fólk hjá Kollafjarðar Kommunu, sum ger alt hetta arbeiðið. Einir 10-15 mans, sigur Hans Jacob Hansen.

Men tað er ikki bara vatnveitingin, sum gjørd verður í Kollafirði í hesum døgum. Ítróttarhøllina hava tey flestu frætt um. Bátahylur er gjørdur á Signabø. Og so er eisini stórt virksemi fram við sjónum inni á Langasandi.

Hans Jacobs Hansen sigur, at grótkastið til bátahylin á Signabø kostaði eina millión krónur.

Inni á Langasandi verður eitt stórt øki planerað til at seta frystihotel á. Eisini er boðið út at gera 100 metrar av bryggjukanti. Hesi tilboðini verða latin upp í vikuni.

Og so fer Kollafjarðar Kommuna at planera eitt stórt øki aftrat frá Langasandi út móti neystunum at hava til at taka, um okkurt skuldi stungið seg upp soleiðis.

Ein flaki hevur verið brúktur at gera botnkanningarnar í samband við hesar planeringarnar. Hann er nú fluttur eitt sindur yvir á fjørðin, tí kommunan vil hava gjørdar kanningar alla staðni, har tað kundi komið upp á tal at gjørt eitthvørt fram við sjósíðuni.

Og tað varð mett skilagott bara at gera kanningarnar nú beinanveg, meðan flakin er tøkur kortini, sigur Hans Jacob Hansen, bygdarráðsformaður í Kollafirði.



Lágtrýstið sunnanfyri Ísland fer spakuliga í landsynning og lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum hvørvur í landnyrðing.



Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum stendur mestsum í stað, meðan lágtrýstið við Biscaya fer móti Norðsjónum.



Hitalagið mált frá 24./05. kl 06⁰⁰–25./05. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,6°C
Minsti hiti máldur í mai: **÷3,0°** Mesti hiti máldur í mai: **19,7°**



Avfallið: 1,8 mm – **mált frá 24./05. kl 6⁰⁰–25./05. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í mai: 20,6 mm

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	–
Nuuk	1
Qaqortoq	7
Ammassalik	5
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	8
Seyðisfjørður	5
Tórshavn	
Lerwick	10
Aberdeen	11
London	16
Tromsø	10
Bergen	10
Oslo	–
Stokkhólm	16
Keypmannahavn	13
Helsinki	12
Moskva	22
Berlin	19
Warzawa	20
Kiev	20
Bukarest	24
Paris	18
Madrid	23
Róm	23
Malorca	25
Athen	23
Malta	22
Tunis	28
Beijing	32
New Dehli	38
Bangkok	34
Jakarta	32
Sydney	16
New York	23
Miami	29
Los Angeles	20
Meksikobýur	24
Panama	31
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	20

Vestfalskyrrindi

22. mai: Mánin longst frá jørðini
26. mai: Seinna kvarter

Kelda: Skipalistin 2000

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp	Suðuroyar-/Vágafirði sp	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp	Hestfirði/Sundalagnum fp	Hestfirði/Sundalagnum sp	Vestmannasundi fp	Vestmannasundi sp	Mykinesfirði fp	Mykinesfirði sp	Nólsoyarfirði fp	Nólsoyarfirði sp	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp	Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp	Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði sp	Hvannasundi fp	Hvannasundi sp	Fugloyarfirði fp	Fugloyarfirði sp
26. mai	0.11	12.38	11.38	—	11.53	—	2.11	14.38	3.11	15.38	10.53	23.24	9.53	22.24	0.26	12.53	1.26	13.53	—	12.23	1.11	13.38
27. mai	1.09	13.43	0.09	12.43	0.24	12.58	3.09	15.43	4.09	16.43	11.58	—	10.58	23.34	1.24	13.58	2.24	14.58	0.54	13.28	2.09	14.43
28. mai	2.19	14.57	1.19	13.57	1.34	14.12	4.19	16.57	5.19	17.57	0.34	13.12	—	12.12	2.34	15.12	3.34	16.12	2.04	14.42	3.19	15.57
29. mai	3.34	16.09	2.34	15.09	2.49	15.24	5.34	18.09	6.34	19.09	1.49	14.24	0.49	13.24	3.49	16.24	4.49	17.24	3.19	15.54	4.34	17.09